## Fyrstur við tí seinasta

### 5 ferðir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum




# Ja!

## Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: __________

Bústaður: __________

Postnr.: __________

Bygd/býur: __________

Undirskrift: __________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# Forkunnugur matur á føroyska døgverðaborðið


*Nú fer Árni Brattaberg eisini at selja mat*

**Ullvirki í Vági fer nú at flyta inn kjøt av moskusoksum, reinsdýrum, umframt alskyns turran fisk úr Grønlandi**

FORKUNNUGT
*Áki Bertholdsen*

Eitt av teimum virkjunum, sum verður við á vørustevnuni í Havn, er Suðuroyar Ullvirki í Vági.

Sjálvandi hava tey eitt úrval av teimum sermerktu Sirri-klæðunum við á stevnunum.

Men tey hava eisini nakað annað.

Árni Brattaberg, sum hevur Ullvirkið, hevur nú fingið samstarv við grønlendingar um at marknaðarføra kjøt av moskusoksum, reinsdýrum, umframt alskyns turran fisk, í Føroyum.

Grønland er ein av teimum útlendsku marknaðinum, har Suðuroyar Ullvirki heldur, at tað fer at bera til at selja pløgg úr føroyskari ull.

– Í Grønlandi eri eg komin í samband við grønlendska virkið, Nuka, sum tekur ímóti kjøti og fiski frá veiðimonnum og útróðrarmonnum í Grønlandi.

– Nuka hevur 21 virki ymsastaðni í Grønlandi, har tey taka ímóti øllum tí, sum grønlendingar veiða, antin tað er kópur, hvalur, fuglur ella annað.

Enn hava teir ikki gjørt nakað serligt burturúr at marknaðarføra hesar vørur uttanlands.

Men nú hevur Árni Brattaberg fingið ta avtalu við Nuka, at grønlendska virkið skal hjálpa Sirri at marknaðarføra klæðir í Grønlandi og afturfyri skal Sirri hjálpa Nuka at marknaðarføra teirra vørur í Føroyum.

Árni Brattaberg sigur, at hann enn hevur hann bara fingið turran fisk heim og hann hevur verið vælumtóktur í Føroyum.

Talan er um skræðuleysan tosk, men á Nuka turka tey eisini alskyns annan fisk, bæði steinbít og kongafisk, og eisini rækjur.

Men harumframt er eisini ætlanin at selja kjøt av moskusoksa og reinsdýrum í Føroyum.

Árni Brattaberg skal ikki selja sjálvur, men hann ætlar at fáa aðrir handlar í Føroyum at selja fyri seg.

Kjøt av reinsdýrum er at fáa í Føroyum, í hvussu so er eitt sindur, og tað er tiltikið gott.

Hinvegin er kjøt av moskusoksa rættiliga forkunnugt, men tey, sum hava roynt tað, siga, at tað er avbera gott.

Hann væntar at fáa tað fyrstu sendingina av kjøti til Føroyar um mánaðarskiftið oktober, november.

– Tað er langur vegur at fáa vørur heim úr Grønlandi, tað tekur umleið ein mánaða, tí alt verður flutt um Danmark.

Àrni Brattaberg vísir tó á, at tað er ein vansi, at Føroyar og Grønland onga samhandilsavtalu hava og tí verður 12% goldið í tolli av øllum vørum og tað ger tær óneyuga dýrar.

Hann leggur ttó afturat, at bæði grønlendskir og føroyskir myndugleikar hava fingið áheitan um at fáa hetta í rættlag.





